KONTRAST

# Heildarætlan fyri Tinganes



Arkitektavirkið Kontrast | Postrúm 226, FO-110 Tórshavn | Tlf 36 3100 / 56 3100 | mayfinn@kontrast.fo

KONTRAST

# Innihaldsyvirlit

**1. Inngang,**

**2. Søga, alment**

**3. Antikvarisk fyrilit, alment**

**4. Uttanumøki**

**5. Brúkarayvirlit, alment**.

**6. Hølisviðurskifti hjá Løgmansskrivstovuni í framtíðini**

6.a forsætismálaráð í øðrum norðurlondum

**7. Bygningar og nýtslumøguleikar**
7.a. friðingar, klausulir og byggisamtyktir

**8. Hølisviðurskifti í framtíðini til onnur stjórnarráð í Tinganesi**

**9. Tinganes sum fornminni og ferðavinnumál í framtíðini**

**10. Kostnaðarmeting**

**11. Tíðarætlan**

KONTRAST

# Inngangur – málsetningur

Arbeiðið er skipað við stýrisbólki, arbeiðsbólki og fylgibólki og sambært arbeiðssetningi og fíggjarlógarteksti.

**Arbeiðssetningur:**

Pkt. 1) Lýsa hvønn bygning sær á matrikul nr. 1, 2, 3, 7, 9, 10, 12a, 12c, 13, 36 og 149 viðvíkjandi navni, friðingarviðurskiftum og klausulum annars, areal, tørv á umvæling og nýtslumøguleikar.

Pkt. 2) lýsa, hvussu løgmaður kann fáa hølisviðurskifti, ið hóska til stjórnararbeiði hansara sum forsætisráðharri

Pkt. 3) lýsa, hvar og hvussu aðrir ráðharrar hóskandi kunnu skipa sítt virksemi í Tinganesi við atliti at virksemi hjá forsætisráðharranum

Pkt. 4) lýsa uttanumøkið

Pkt. 5) lýsa, hvussu Tinganes serliga úti, men eisini partvís inni, kann koma til sín rætt sum fornminni og í sambandi við ferðavinnu

Pkt. 6) meta um kostnaðin

Pkt. 7) meta um tíðarnýtsluna og uppskot um at raðfesta arbeiðið so, at karmarnir um stjórnararbeiðið koma uppá pláss sum fyrst.

**Fíggjarlógartekstur**:

"Játtanin fer til at umbyggja, umvæla og skipa ognir landsstýrsins í Tinganesi. Endamálið er, at Tinganes fæst á eitt støði, sum sømir seg eini stjórnar- og forsætisráðharrafyrisiting, samstundis sum tað í síni heild verður umvælt og skipað so, at tað kemur til sín rætt sum fornminni, ið myndar okkara søgu og tjóðarsamleika.

Í 2008 er ætlanin fyrst og fremst at arbeiða víðari við at umvæla Stokkastovuna, samstundis sum ein langtíðarætlan og verkætlanarlýsing skal gerast fyri omanfyri nevndu heildarætlan fyri Tinganes.

Verkætlanarlýsingin verður gjørd í einum samstarvi millum Løgmansskrivstovuna, Fornminnissavnið, Landsverk og umboð fyri tey stjórnarráð, ið umframt Løgmansskrivstovuna húsast í Tinganesi. Harumframt er ætlanin at draga aðrar viðkomandi stovnar o.o. við í verkætlanina eftir tørvi. Her verður serliga hugsað um SamVit, Tórshavnar Býráð og møguliga onnur, ið hava serligan áhuga í Tinganesi. Játtanin í 2008 verður sostatt nýtt til ráðlegging, bygging og útvegan av serligum tilfari um Tinganes. Viðvíkjandi bygging verður ræðisrætturin á játtanini flutt til Landsverk."

# Søga, alment

KONTRAST

# Antikvarisk fyrilit, alment

# Uttanumøki



# Uttanumøki




Við yvirlitskorti er uttanumøki í stuttum og í høvuðsheitum lýst við tilfari úr bókini **'Spor í Tinganesi'** eftir Rolf Guttesen.

Av teimum 19 lokalitetunum, sum bókin er bygd upp í, eru 1-12 í tí uttasta partinum avTinganesi, sí yvirlitskort.
Á lokalitetunum eru ein røð av merkjum í hellum, klettum og á húsaveggjum umframt at høvundurin greiður frá søgu o.ø., ið knýtt er at støðunum.
Tær her vístu myndirnar v/ lokaliteti er eitt úrval.

Á yvirlitskortinum eru allir 12 lokalitetirnir markeraðir. Stórar markeringar siga frá fleiri merkjum á lokalitetinum.

**A. Kirkjugarður.**
Her stóð gamla kirkjan frá 1609 og kirkjugarður var rundanum. Í dag opin og grasvaksin garður.

**B. Kleinsgarður / Kleinsbakki.**
Garðurin ber navn eftir fyrsta handilsforvaltara hjá Kongaliga Handlinum Jørgen Christian Klein 1709-20. Fyrr var ein grunn vík inn her. Grundin undir garðinum var eitt langt strekki í sjónum, áðrenn bryggjan varð laðað millum Vippuna og Sælingahellu fyrst í 1900-talinum.

**C.** Opin grasvaksin garður norðan fyri Sethúsini. Hesin var eina tíð brúktur sum fongsulsgarður, ta tíðina fongsul var í sethúsunum. Tá var bygt uppfyri báðumegin við stakitti og úthúsum, so ikki sást inn í garðin.

**D.** Vestan fyri Bakkapakkhúsið er lítil grasvaksin garður, girdur av grótlaðing og jarngelendara.

**E.** Steinsett tún / øki



**1. Við Vippuna**
Staðið er eitt gamalt arbeiðsøki frá Kgl. Handilstíðini, har lossijaktir løgdu at og handilsfarmur varð lossaður.
Á vippusteini stóð vippukrani og haðani gongur ein gamal bjálki inn á land.



**2. Við uppgongdina**
Her sæst ANO-steinurin við týðiligum bókstavum og árstali, 1609.
Uppi á steininum liggur skjøldur við merkinum PMI.



**8. Við bonkin**
Her er m.a. eitt áhugavert merki - sum búmerki eitt av teimum størru á Nesinum.



**9. Vestan fyri Skansapakkhúsið**
Umframt merkir í klettum er her trappa niður á teir niðaru klettarnar - útfyri fyrrv. hurð inn í kjallarin í Salinum.







**10. Bakaríið og Corps de Garde**

**Bakaríið.** Á stóra og flata steininum í grundini undir Bakarínum er eitt merki, SA,1773.
**Corps de Garde.** Á suðursíðuni Portugálinum sæst tað absolutt prýðiligasta av øllum merkjum í Tinganesi. Her er kongakróna, monogramm, árstal og navnið á lensmanninum Gabel.






**11. Vestan fyri Bakkapakkhúsið**
Merkini á hesum lokaliteti eru í tveimum støðum.
Tað mest áhugaverda merki er á einum kletti, sum liggur hálvt undir tí hvítmálaðu grundini á Bakkapakkhúsinum. Nøkur onnur eru á tí laðaða garðinum fram við bakkanum.



**12. Múrur á Leigubúðini**
Í steinunum í tí hvítmálaðu grundini undir Leigubúðini eru tríggir stórir flatir steinar við týðiligum bókstavum.



KONTRAST

# Brúkarayvirlit, alment.




| | | | |
|---|---|---|---|
| Matr.nr.1 | Skansapakkhúsið | Matr.nr. 2 | Portugálið |
| | Salurin | Matr.nr. 3 | Pakkhúsið á Sælingahellu |
| | Sjó – Vektarbúðin | Matr.nr. 7 | Síðubygn. Evensens pakkhús |
| | Bakkapakkhúsið | " | Hjallur/neyst |
| | Leigubúðin | Matr.nr. 9 | K. Poulsen (Reynagarður) |
| | Munkastovan | Matr.nr. 10 | Suðurlonin (Reynagarður) |
| | Skibsteds pakkhús | Matr.nr. 12a | Johs. J. Olsen /vestara hús (Reynagarður) |
| | Stokkastovan | " | " /eystara hús (Reynagarður) |
| | Sethúsini | Matr.nr. 12c | Egholms hús (Reynagarður) |
| | Bryggihúsið | Matr.nr. 13 | Evensens pakkhús |
| | | Matr.nr. 36 | Kristnastova |
| | | Matr.nr. 149 | Skansagarður |

KONTRAST




# Brúkarayvirlit, alment

- (LMS) Løgmansskrivstovan
- (LMS) Goymsla, umsjón.
- (URR) Uttanríkisráðið
- (IMR) Inlendismálaráðið
- (VMR) Vinnumálaráðið
- (FMR) Fíggjarmálaráðið, KT-fyrisit.
- EDV-,TLF- og HITAmiðstøð
- Útleigan
- Undir umvæling / ikki í nýtslu

KONTRAST

# Bygningar, sí fylgisskjøl 1-22


1. Matr.nr. 1
Skansapakkhúsið


2. Matr.nr. 1
Salurin


3. Matr.nr. 1
Sjó- Vektabúðin


4. Matr.nr. 1
Bakkapakkhúsið


5. Matr.nr. 1
Leigubúðin


6. Matr.nr. 1
Munkastovan


7. Matr.nr. 1
Skibsteds pakkhús


8. Matr.nr. 1
Stokkastovan


9. Matr.nr. 1
Sethúsini


10. Matr.nr. 1
Bryggihúsið


11. Matr.nr. 2
Portugálið


12. Matr.nr. 3
Pakkhúsið á Sælingah.


13. Matr.nr. 7
Hjallur / neyst


14. Matr.nr. 7
Síðubygn. Ev. pakkh.


15. Matr.nr. 9
K.Poulsen, Reynag.


16. Matr.nr. 10
Suðurlonin, Reynag.


17. Matr.nr. 12a (vest.)
Johs. J. Olsen, Reynag.


18. Matr.nr. 12a (eyst.)
Johs. J. Olsen, Reynag.


19. Matr.nr. 12c
Egholms hús, Reynag.


20. Matr.nr. 13
Evensens pakkhús


21. Matr.nr. 36
Kristnastova


22. Matr.nr. 149
Skansagarður

Arkitektavirkið Kontrast | Postrúm 226, FO-110 Tórshavn | Tlf 36 3100 / 56 3100 | mayfinn@kontrast.fo

# Hølisviðurskifti hjá Løgmansskrivstovuni í framtíðini

**Móttøka**

Móttøkan tekur ímóti og vísur fólkum inn ella kallar starvsfólk út at taka ímóti viðskiftafólki. Journalisering og at taka tlf + videoeftirliið er partur av arbeiðinum. Móttøkan má vera centralt staðsett og virka sum eitt slag av trygdarslúsu fyri allan bygningin, tvs. at ein og hvør kann koma framat móttøkuni, men ikki víðari inn í húsið.

**Reseptiónshølir**

Receptiónshølir kunnu liggja fyri seg og ikki knýtt beinleiðis at umsitingini. Hølini verða serliga nýtt, tá útlendskir gestir koma á vitjan ella tá eitthvørt hátíðarlig tiltøk skal húsast. Hølini skulu vera tignarlig, sjáldsom og bera brá av góðsku, og umráðandi er at hølini ikki verða slitin, men varðveita bráin av tí forkunnuða. Hetta ger seg galdandi bæði fyri innbúgv og rúm. Miðjast skal ímóti at bæði hava eitt størri rúm og minni rúm, kanska fleiri minni.

**Fundarrúm**

Umráðandi er at fundarrúmini liggja ósmæðin, tvs. at tað ikki er ljóðhoyrt til hjáliggjandi rúm. Fundarhølini skulu helst verða javnt býtt, soleiðis at tað ikki er langt til nærmasta fundarrúm og helst gongt innandura. Ymiskt er hvussu stór fundarrúmini nýtast at vera, tískil skulu hesi vera í ymiskum støddum, bæði størri og smærri – øll fundarrúm skulu hava góðan akustikk, útlufting og uppvørpu. Skilast skal millum hvørji fundarhøli, løgmaður hevur til taks og hvørji umsitingin hevur til taks.

**Audiotorium**

Staðsetingin av auditorium er rættiliga fleksibul, tað er ikki neyðugt at liggja í beinleiðis sambandi við fyrisitingina – tað kann tó vera ein fyrimunur at hetta liggur nærhendis minni fundarrúmum, soleiðis at auditoriuvirksemi eisini kann skipast saman við workshop ot. Eisini er neyðugt við rúmligari forhøll, sum kann rúma fólki tá steðgur er o.t. Auditorium verður serliga nýtt í samb. við størri fyrilestrar og skeið – hetta skal tískil hava nýmótans AV-útgerð, umframt góðan akustikk og luftskifti. Hetta er ein stór íløga, sum skal verjast við at øll stjórnarráðini skulu hava atgongd til auditorium.

KONTRAST

**Framsýningarrúm**

Framsýningar eiga at verða skipaðar, har rúmini ikki eru egnað til fyrisiting ella receptión. Hetta tí framsýningarhøli eru meira fleksibul og krevja ikki dagsljós o.s.fr. Tinganes hevur eina sera áhugaverda søgu, sum eigur at verða miðlað til tey vitjandi. Hetta skal hugsast sum ein opin framsýning uttan stórvegis umsiting ella neyðuga trygd.

**Samrøðurúm**

Samrøðurum skulu liggja sama stað sum skrivstovur.  Hesi verða serliga nýtt til fundir millum 2-4 fólk, bæði innanhýsis og til viðskiftafólki  - Um møguligt skulu hesi vera staðsett nærhendis móttøkuna, soleiðis at fólki ikki nýtist at koma inn í skrivstovuumhvørvið.

**Kreppurúm**

Staðseting av kreppurúmi skal helst vera beinleiðis í sambandi við hølini hjá løgmanni, soleiðis at tað slepst skjótt til og frá. Rúmið skal skipast við egnari tlf. , interneti, sjónvarps- og útvarpsútgerð umframt aðra AV-útgerð. No break anlegg skal tryggja rúmi móti myrkalegging. Rúmið skal vera tøkt til allar tíðir og nýtast í sambandi við  bæði fíggjarligar, politiskar og humaniterar kreppur – alt sum krevur bráðfeingis umrøðu og avgerðir. Hetta kann samskipast við eitt fundarrúm til dagligt.

**Fjølmiðlarúm**

Staðsetingin av fjølmiðlarúminum er rættiliga fleksibul, tað er ikki neyðugt at liggja í beinleiðis sambandi við fyrisitingina. Hølini skulu nýtast hjá løgmanni og fyrisiting hansara í samband við kunning av almenningi og fjølmiðlum, bæði til dagligt og til bráðfeingis hendingar.  Teknikkur til útvarps- og sjónvarpsútgerð  skal skipast . Hølini skulu vera tignarlig, ruddilig, soleiðis at boðskapurin ikki verður doyvdur av umhvørvinum.

**Bókasavn**

Bókasavn skal skipast soleiðis at allar bøkur verða miðsavnaðar. Hetta ger seg eisini galdandi fyri tíðarrit. Bøkurnar eru bæði faklitteraturur og uppslagsverk – sum t.d. lógarsøvn, løgtingstíðindi og kunningarsavnið.

Staðsetingin skal vera soleiðis at tað ikki er ov langt frá fyrisitingarhølunum, tí stórur partur av savninum er arbeiðsskjøl sum skulu vera atkomulig uttan at verða ein er noyddur at fara burtur frá arbeiðsplássinum, tvs. at tað helst skal vera gongt innandura til savnið. Hølini skulu hava pláss til reólir og borð at leggja bøkur umframt lesipláss - eisini hevði verið hent við internetatgongd og digitalari bókasavnsskipan. Hetta kundi verið gjørt í samstarv við Landsbókasavnið.

**Skrivstovur hjá starvsfólki**

Roknast skal við at flest allar skrivstovur vera 1-mans skrivstovur við borði, skrivstovustóli, 2-3 reólum og rullikassetti undir borðinum – pláss skal vera fyri 2 stólum til viðskiftafólki yvirav skriviborði. Annars allar vanligar innleggingar sum eru standard til skrivstovur – print og skann skal ikki vera á skrivstovuni. Deildarleiðararnir skulu eisini hava pláss til samrøðuborð við 4 stólum inni í skrivstovuni.

**Skrivstovur hjá løgmanstjóra**

Skrivstova hjá løgmanstjóra skal vera knýtt at hølunum hjá løgmanni – soleiðis at hesi kunnu arbeiða í tøttum samstarvi – Løgmanstjóri skal hava tignarlig og rúmlig høli við arbeiðsplássi, fundarborði og sofabólki. Skrivari við egnari skrivstovu skal vera upp móti skrivstovu hjá løgmansstjóranum.

**Skrivstovur og privat hølir hjá Løgmanni**

Løgmaður skal hava høli til taks, sum bert eru til hansara brúk.

Hesi eru :

- Skrivstovu, við smærri fundarborði og sofabólki
- Uppihaldsrúm við sovifunktión, toiletti og umklæðing
- Størri fundarrúm í beinleiðis sambandi við skrivstovuna til 16-20 fólk
- Forhøll/bíðirúm til gestir at uppihalda seg í til løgmaður hevur tíð at taka ímóti
- Gestatoilett í samband við bíðirúm/forhøll

**Køkur, kaffistova hjá starvsfólki**

Køkur og kaffistova til starvsfólk skal skipast í beinleiðis innandura sambandi við skrivstovu. Hølið verður brúkt til kaffipausur, og starvsfólkasamrøðurúm – ikki til matgerð ella døgurðasteðg. Soleiðis skipa at tað eisini kann virka sum eitt fakligt torg hjá starvsfólki at hittast og umrøða umsitingarligar spurningar o.a.

**Køkur, kaffistova hjá løgmanni**

Løgmaður skal hava kaffistovu til steðgir og óformelt prát við starvsfólk síni – men eisini til samling av landsstýrisfólki til morgunmatarborð áðrenn landsstýrisfundir o.t.

**Matstova hjá starvsfólki**

Matstovan til starvsfólk kann staðsetast sjálvstøðugt og ikki í beinleiðis samband við skrivstovur. Verandi loysn í kjallaranum í Skansapakkhúsinum, sýnist av virka væl!

**Matstova hjá Løgmanni**

Løgmaður hevði havt nógv gagn av at hava egna matstovu, um tað varð skipað soleiðis at landsstýrisfólkini ótu døgurða saman hvønn dag. Hetta hevði gagnað felags fótastevi og forstáilsi sínámillum fyri arbeiðinum í teimum ymsu ráðunum. Møguligt hevði verið at umrøtt hvørji mál arbeitt varð við og hvørjir trupulleikar kundu stinga seg upp.

**Kopi**

Kopi skal miðsavnast og ikki vera inni á skrivstovuni.

**Aðrar servicefunktiónir sum eisini skulu rúmast á Tinganesi:**

Klædnagoymsla.

Goymslurúm

Skjalagoymslur

Brannboks

Verkstaður og hitarúm

WC/Bað

Reingerðarrúm

**Trygdarskipan;**

DBI góðkend brunaskipan skal umfata allar bygningar á Tinganesi – Kortskipan sum verandi loysn í allari bygginingini. Avtala skal vera við vaktargarð um ansing ímóti innbroti. Støða skal takast til hvørt sjóngáur skulu setast upp í umhvørvinum í størri mun. Høvuðsinngongin skal skipast soleiðis at atkomiligt er inn í forhøll/bíðirúm, men ikki inn um móttøkuna.

**Uttanum øki**

Í byggiskránni skal heildarætlan gerast fyri hvussu skelting, ljósseting og álegging av túnunum verður skipað.

**Leyst innbúgv**

Í byggiskránni skal heildarætlan gerast fyri hvussu kriteriir fyri val av innbúgv verður skipað.

**Bygningslutir annars**

Í byggiskránni skal heildarætlan gerast fyri hvussu innandura planting, listarlig prýði, gólv, skilaveggir, loft, vindeygu, ljósseting og hurðar verður skipað.

**Serlig krøv:**

Í byggiskránni skal heildarætlan og lýsing gerast fyri hvussu nógv luft er, ella fermetrar pr. fólk, hvørji søgulig og fornfrøðilig / minnisverdug atlit skulu takast, hvat 'image' vil statsministeriið hava (t.d. opið, demokratisk, tignarligt v.m.), umstøður hjá rørslutarnaðum umframt totaløkonomisk viðurskifti til rakstur og viðlíkahald, herundir bjálving.

KONTRAST

# Forsætismálaráð í øðrum norðurlondum

Kunningarferð varð skipað í byrjanini av desember 2008 í samband við framleiðslu av Heildarætlan fyri Tinganes. Luttakandi á ferðini vóru Jónhild Johannesen og Mayfinn Norðoy vegna Kontrast Arkitektar. Eyðun Luid og Kristianna Sjóvará Jakobsen vegna Løgmansskrivstovuna. Bent Tommy Linklett vegna Landsverk.

Ferðaliðið var áhugað at síggja, hvørji hølir løgmansfyrisitingarnar í teimum norðlensku londunum hava til taks tvs. skrivstovur, fundarhølir, móttøkurúm o.s.fr. umframt hvørji hølir (íroknað. innrætning) fyrisitingin hevur. Eisini var tað av stórum áhuga hjá ferðaliðinum at síggja hvussu fornminni o.a tílíkt verður varðveitt, fjølmiðlað og ment í samband við at fleiri av umsitingunum húsast í eldri og varðveitingarverdum bygningum. – Hetta samstundis sum at fyrisitingarnar hava nútíðmans hentleikar og trygdarskipanir fyri neyðini.

Ymiskt er frá stað til stað hvussu ráðini vóru skipaði við rúmum, arbeiðsgongd og nýtslu av teimum ymsu funktiónunum. Frágreiðingin er skipað soleiðis at rúmfunktiónin ella fokusøkið ber yvirskriftina og londini koma so hvør í sínum lagi við teirra loysn ella mangul á ítøkiligu funktiónini.

**Móttøkan**

Mótsetningurin millum móttakararnar í Danmark og Svøríki var at í Danmark varð ein møttur við stongdari hurð, meðan Svøríki valdi at bjóða øllum inn í forhøllini, sum eisini var sera rúmlig, leggjast undir trygd. Hinvegin slapst ikki ótarnað víðari frá forhøllini, tvørturímóti var trygdin innan nógv hægri enn í Danmark. Í Íslandi var móttøkuparturin aftanfyri stongda hurð. Vansin í Íslandi var at LMS fyrisitingin var spjadd í fleiri bygningar og tískil vóru fleiri móttøkur – nærum ein pr. deild.





*Danmark*





*Svøríki*




*Ísland*

**Reseptiónshølir**

Í Danmark var tað serliga riddarsalurin sum drotningin eisini brúkti, ið var av stórum áhuga. Í Svøríki vóru nógv ymisk rúm at taka til, bæði í stødd og tign. Ísland hevði mest áhugaverdu loysnina við einum móttøkuhúsi, ið eisini innihelt privatkontór, fundarrúm og hvílíøki hjá løgmanni.




*Svøríki*

KONTRAST



*Danmark*

KONTRAST











KONTRAST



*Ísland*

**Fundarrúm**

I Danmark høvdu tey ein trupulleika av ov fáum smærri fundarhølum, tey høvdu bert størri fundarrúm til taks og tískil manglaðu oftani høli til teir smærru fundirnar. Svøríki hevði eina serstaka skipan, í og við at øll stjórnarkontórini vóru í sama umhvørvi, bundin saman av tunlum. Hetta gjørdi at tey kundu gagnnýta fundarhølini á nógv betri hátt við nógvum størri og smærri rúmum til fundir – bæði við og uttan mati.







*Danmark*




*Ísland, fundarhøli hjá løgmanni* *Danmark, fundarhøli hjá starvsfólki*

**Samrøðurúm**

Í Íslandi vóru fleiri samrøðurúm at finna, hetta serliga ti at bygningarnir vóru spjaddir út á sama hátt sum í Føroyum. Í Danmark var stórur saknur á hesum minni samrøðurúmunum, meðan Svøríki ikki sýntist at hava hetta fyri neyðini, eftirsum tey vóru so væl fyri við nógvum fundarhølum. Í Danmark var stórur saknur í minni fundarhølum og samrøðurúmum




*Ísland*

## Kreppurúm

Øll londini høvdu skipað seg við kreppurúmum – her kundu íslendingar vísa á at teirra kreppurúm hevði verið í støðugari nýtslu gjøgnum 2-3 vikur í allari fíggjarkreppuni.





*Ísland*

## Audiotorium

Tað var bert Svøríki sum hevði egið autitorium til taks – hetta óivað av tí at stjórnarráðini kundu gagnnýta hetta betur. Meðan hini londini leiga sær pláss úti í býnum til hetta endamál. Í Danmark var stórur saknur í audiotorium, hetta varð ofta leiga úti í býinum





*Svøríki*

## Framsýningarrúm

Svøríki hevði eina framsýning um bygging hjá sær, henda var skipað sum ein planchuframsýning í forhøllini til auditorium og frjølmiðlarúm fyri fólki, meðan tey bíðaðu eftir at fara víðari inn í hjáliggjandi hølini.



*Svøríki*

## Fjølmiðlarúm

Bæði Danmark og Svøríki høvdu væl skipað fjølmiðlarúm – Svøríki hevði eitt størri og eitt minni rúm – tað størra var skipað við tulki. Í Íslandi var fjølmiðlarúm í móttøkuhølinum, tó uttan stórvegis tekniskar innleggingar.





*Danmark*

  

*Svøríki*

## Bókasavn

Bókasøvnini vóru fyrst og fremst skipaði sum partur av gongsøkjum ella gjøgnumgangsrúmum – oftani verða bøkurnar tiknar úr reólini og inn á skrivstovurnar til nýtslu, men smærri borð vóru eisini skipað nærhendis bókagoymsluni.

 

*Danmark*

## Skrivstovur hjá starvsfólki

Ymiskt var hvussu støðið á skrivstovunum var. Í Danmark høvdu tey stóran sakn í fleiri einmans skrivstovum, men eftirsum at bygningurin hjá teimum fyrst og fremst var býttur í stór rúm, var hetta neyðugt – onkur óheppin roynd at býta stór rúm til einmansskrivstovur var framd. Ynski hjá donsku umsitingini var at øll høvdu einmansskrivstovu. Í Svøríki vóru nærum allar einmansskrivstovur. Í Íslandi vóru hølisviðurskiftini soleiðis skipað, at skerming var nógv nýtt í staðin fyri avskildring, oftani 2 fólk saman.




*Danmark*

## Skrivsstovur hjá løgmansstjóra

Skrivstovurnar í ymsu londunum vóru allar skipaðar í óbeinleiðis sambandi til løgmann, við skrivaraskrivstovu, ið hevði hurð beinleiðis til aðalstjóra. Àherðsla er løgd á góðsku og tign við ljósum rúmum og rúmligum høli hjá løgmanni.




*Danmark*

KONTRAST




*Ísland, skrivstova hjá skrivara og aðalstjóra*

**Skrivstovur og privat hølir hjá Løgmanni**

Í Danmark hevði løgmaður eitt størri høli við arbeiðsborði, fundarborði og sofabólki. Móttøkan og nógv fyrisitingarligt arbeiði verður framt á Marienborg, sum eisini inniheldur privathøli sum td. sovifunktiónir etc. Fyrr hevur løgmaður húsast her, men í nýggjari tíð hevur løgmaður búð í egnum húsi.Í Svøríki …Í Íslandi var løgmaður sera væl skipaður við bygningi til fyrisiting sína, móttøku við privatum parti, umframt løgmanssbústað – øll trý støð við arbeiðsplássi og fundarrúmi til løgmann.




*Danmark*




*Danmark*




*Ísland*

**Køkur, kaffistova hjá starvsfólki**

Øll Norðurlond høvdu skipaða kaffistovu við tekøki. Hetta var serliga væl skipað í Svøríki við ymsum møguleikum at sita og standa, soleiðis at tað eisini virkaði sum eitt fakligt torg hjá starvsfólki at hittast og umrøða umsitingarligar spurningar o.a.



*Svøríki*



*Ísland*

KONTRAST

## Køkur, kaffistova hjá løgmanni

Tað var serliga í Svøríki at kaffistova var skipað fyri seg til løgmann. Hetta tí landsstýrisfólkini høvdu eina áhugaverda tradition at hava morgunmatin í felag





*Svøríki*

## Matstova hjá starvsfólki

Serliga Svøríki hevði væl skipaða matstovu sum øll stjórnarráðini nýttu, umframt tænastufólk hjá m.a. løgmanni og postverki. Danmark... Ísland ...



*Svøríki*

KONTRAST

### Matstova hjá Løgmanni

Í Svøríki er tað kotuma at statsministarin og ráðharrar eru saman um døgurðatíð – eisini til morgunmat – alt virkaði sera væl – umráðandi er at matstovan er ósmæðin, soleiðis at málini kunnu unmrøðast, uttan at tað fór víðari. Danmark... Ísland ...



*Svøríki*

### Uttanumøki

Danmark var komið til læsta hurð við sjóngáa áðrenn ein slapp inn, tað sama var galdandi í Íslandi. Í Svøríki var hinvegin atkomiligt úr forhøllini – hetta var eitt val sum tey høvdu gjørt fyri at gera umsitingina opna fyri viðskiftafólki.





*Danmark*

KONTRAST






*Svøríki*

## Kopi



*Danmark, verja gólv fyri slit*





*Ísland*

## Roykirúm



*Danmark*



*Svøríki*

## Trygdarskipan



*Svøríki*



KONTRAST

## Skelting







*Danmark*




*Svøríki*



*Ísland*

## Ljósseting



*Danmark*





*Ísland*

**Leyst innbúgv**

Nógv orka verður løgd í tað rætta innbúgvið í hinum norðurlondum – valið av innbúgvi var týðiliga tjóðskaparligt, bert við møblum úr egnum landi – Í Danmark var tað Wagner, Klint og Arne Jacobsen, meðan tað í Svøríki serliga var Lammhult og Kinnarps. Í Íslandi vóru nógvir íslendskir snikkaraframleiddir lutir.

**Umstøður hjá rørslutarnaðum**



*Svøríki*

**Listarlig prýði**



*Danmark*



*Ísland*



*Svøríki*

KONTRAST









Móttøkuhúsið í Íslandi



The Government offices, downtown Reykjavík







Fyristingarbygningur í Íslandi

Arkitektavirkið Kontrast | Postrúm 226, FO-110 Tórshavn | Tlf 36 3100 / 56 3100 | mayfinn@kontrast.fo

# Hølisviðurskifti í framtíðini til onnur stjórnarráð í Tinganesi

Í Visión 2015 stendur Skrivað: "*Lóggávan og almenna umsitingin verða miðvíst skipað soleiðis, at tey hóska til eitt lítið land sum tað føroyska. Almenni gerðin skal á besta hátt veita borgarum og fyritøkum góða og skjóta tænastu.*

*Nýggj almenn játtanarskipan verður innførd, har Landsstýrið í samráðingum innan 1. mai setur teir makrobúskaparligu karmarnar fyri komandi árið.*

*Nýggj játtanarskipan verður sett í verk, har Landsstýrið í samráðingum innan 1. mai setur teir makrobúskaparligu karmarnar. Í hesum sambandi skulu inntøkur og útreiðslur hjá kommununum og hjá almennum grunnum eisini ásetast, so at yvirskipað stýring er á almenna búskapinum. Almenni fíggjarkarmurin skal góðkennast í Løgtinginum.*

*Frá 1. mai til 1. oktober verða raðfestingarnar á ymsu rakstrarøkjunum ásettar innan avtalaða karmin. Henda mannagongd viðførir betri møguleikar hjá almennu leiðslunum at leggja komandi fíggjarárið til rættis, umframt at hækka almenna tænastustigið.*

*Tá mannagongdin er broytt, til at samráðst verður um ein samlaðan, almennan fíggjarkarm, verður møguleiki fyri, at førdur kann verða ein samskipaður búskaparpolitikkur fyri Føroyar. Dentur fer tí ikki einans at verða lagdur á úrslitið hjá landskassanum, men heldur á samlaða, almenna búskapin. Hetta hevur týdning, bæði tá ið ræður um konjunkturbúskaparpolitikk, og tá raðfestast skal, hvussu nógv tað almenna sum heild skal nýta til ymsu økini.*

*Miðfyrisitingin verður savnað á einum stað, og talið á umsitingarligum eindum verður minkað munandi.*

*Samskipan og samskifti eru týdningarmikil amboð, tá ið umsitingin skal fremja ætlanir sínar á besta og bíligsta hátt. Við at savna miðfyrisitingina á einum stað fáa vit eitt breiðari og betri*

*fakligt umhvørvi, samskiftismøguleikarnir verða betri, og harvið eisini vitanargrundarlagið, tá ið avgerðir skulu takast. Hølisviðurskifti eru ikki til at savna miðfyrisitingina í dag. Tí er neyðugt at byggja, um málið um at savna miðfyrisitingina skal røkkast. Ein møguleiki er at byggja ein heilt nýggjan bygning, ið kann húsa miðfyrisitingini undir sama taki, og sum er bygdur til endamálið. Hóast ein slíkur bygningur er ein stór íløga, fæst partur av kostnaðinum inn aftur, m.a. við sølu av øðrum bygningum, og við at spart verður í húsaleigu.*

*Hugsjónin aftan fyri málið um at minka talið á umsitingarligum eindum tekur støði í tí sannroynd, at tá Føroyar er eitt lítið land, vil eindarkostnaðurin av almennum stovnum nærum altíð vera størri í Føroyum enn í øðrum londum, og tí er ein meiri tilvitað tillaging til hesa sannroynd ein fyritreyt, um Føroyar skulu vera millum fremstu lond í heiminum. Meiri skal tí verða hugsað um at skapa størri og sterkari eindir, ið kunnu megna skiftandi*

*Lóggávan og almenna umsitingin verða miðvíst skipað soleiðis, at tey hóska til eitt lítið land sum tað føroyska. Almenni geirin skal á besta hátt veita borgarum og fyritøkum góða og skjóta tænastu. avbjóðingar í nútímans samfelagnum. Eitt miðvíst arbeiði eigur tí at verða gjørt fyri at leggja saman ella at samansjóða almennar stovnar. Mett verður at eitt rímiligt minstamark á stovnseindum er um 15-20 starvsfólk."*

Út frá hesum sjónarmiðum verður mælt til at arbeitt verður fram ímóti at øll miðfyrisitingin verður savna kring Tinganes tvs. at staðsetingin kann eisini fara út móti Skálatrøð, niðan móti R.C. Efferøesgøtu og Úti við Strond. Men ætlað soleiðis at felagsfunktiónir sum t.d. konferansurúm, audiotorium, kantina, móttøkuhølir, fjølmiðlarúm osfr. kann gagnnýtast av øllum ráðunum. Arbeiðið við byggiskránni skal innihalda frásøgn um hvussu hetta verður skipa best.

Tað er ynski hjá Løgmannskrivsstovuni at Innlendismálaráðið og Uttanríkisráðið fyrst og fremst skal skipast í Tinganesi, tí hesu ráð hava størst skeringsflatu við løgmann. Í hvønn mun tað ber til at fáa 2 ella 3 ráð afturat Løgmansskrivstovuni skal vera lýst í byggiskránni.

KONTRAST

# Nýtslumøguleikar

**Funktiónir sum fyrisitingin hevur brúk fyri í framtíðini:**

- Móttøka
- Framsýningarhølir
- Gestaíbúð
- Soviklivar
- Hvíliøki hjá Løgmanni
- Reseptiónshølir
- Fundarrúm stór (20-30 fólk)
- Fundarrúm smá (6-8 fólk)
- Fundarrúm, sum er vælútgjørt við tøkni. Ikki ov stórt, men skal kunna gerast størri (t.d. stórt fundarrúm, sum kann deilast í tvey við dragihurð e.l.
- Audiotorium
- Samrøðurúm
- Fjølmiðlarúm
- Bókasavn
- Skrivstovur
- Køkur, kaffistova
- Kantina

- Klædnagoymsla
- Goymslurúm
- Skjalagoymslur / journal
- Brannboks

- Verkstaður og hitarúm
- WC/Bað
- Motiónsrúm
- Reingerðarrúm
- Ko



1. Skansapakkhúsið



3. hædd / loft



2. hædd



1. hædd



Kjallarahædd

*1. og 2. hædd:*
Reseptiónshølir
Fundarrúm til løgmann og landsstýri
Samrøðurúm
Skrivstova hjá løgmanni og skrivara
Skrivstova hjá løgmansstjóra
Kaffistova hjá løgmanni
Kantina hjá starvsfólkum

Klædnagoymsla
Goymslurúm til reingerð

WC/Bað
Reingerðarrúm
Kopi

*Kjallari:*
Felags kantina hjá starvsfólkum í Tinganesi
Skrivstova, wc v.m. hjá kantinustarvsfólkum

*Loft:*
Hvílíøki hjá Løgmanni á loftinum

---



2. Salurin

Móttøka, bókasavn og bíðirúm
Samrøðurúm
Kaffistova hjá starvsfólkum á LMS
Felags kantina hjá starvsfólkum í Tinganesi



3. Sjó-Vektabúðin




Móttøka og telefonvekslari
Fundarrúm (stór og smá)
Samrøðurúm
Bókasavn
Kaffistova
Skrivstovur

Klædnagoymsla
Goymslurúm
Skjalagoymsla/ journal
Brannboks

WC/Bað
Reingerðarrúm
Kopi
Motiónsrúm

---



4. Bakkapakkhúsið




Móttøka
Fundarrúm
Samrøðurúm
Bókasavn
Skrivstovur

Klædnagoymsla

Goymslurúm
Skjalagoymsla/ journal

WC/Bað
Reingerðarrúm
Kopi

---



5. Leigubúðin










Fundarrúm
Samrøðurúm, í kjallara
Bókasavn, í kjallara
Skrivstovur
Køkur, kaffistova til starvsfólk, í kjallara

Klædnagoymsla
Evt. skjalagoymsla
Goymslurúm

WC/Bað
Reingerðarrúm
Kopi



6. Munkastovan










Reseptiónshølir
Verkætlanarrúm
Samrøðurúm
Framsýningarhøli /søga-fornminni

KONTRAST



7. Skibsteds pakkhús




2. hædd / loft




I. hædd




Kjallarahædd

Móttøka
Fundarrúm á loftinum
Samrøðurúm
Skrivstovur
Kaffistova til starvsfólk
Verkætlanarrúm

Klædnagoymsla
Goymslurúm

WC/Bað
Goymsla til reingerð
Kopi



8. Stokkastovan



2. hædd / loft



I. hædd Loft



Krúpikjallari Kjallari

Móttøka
Framsýningarhøli /søga-fornminni
Reseptiónshølir
Fjølmiðlarúm

WC/Bað (evt. í Bøkjarínum)
Reingerðarrúm (evt. í Bøkjarínum)

Skjalagoymslur

WC/Bað
Reingerðarrúm
Kopi

---



9. Sethúsini




Hvíliøki hjá løgmanni
Móttøka
Fundarrúm
Samrøðurúm
Skrivstovur
Motiónsrúm
Køkur, kaffistova til starvsfólk
Fjølmiðlarúm í kjallara - um LMS fær Sethúsini (evt. tunnil tvørtur undir túnið frá Sjó-Vektabúðini)

Klædnagoymsla
Goymslurúm



10. Bryggihúsið




Goymslurúm
Skjalagoymslur
Brannboks
Verkstaður
WC

KONTRAST



11. Portugálið




Fundarrúm
Samrøðurúm
Skrivstovur
Kaffistova

WC/Bað



12. Pakkhúsið á Sælingahellu




Fundarrúm
Samrøðurúm
Kaffistova
Skrivstovur

Klædnagoymsla
Goymslurúm
Skalagoymsla/ journal

WC
Reingerðarrúm
Kopi
Í kjallaranum er Edv-tlf-hitamiðstøð

![KONTRAST logo]



13. Hjallur-neyst



14. Síðubygn. Evensens pakkhús




Goymslurúm
WC - alment
Felags hjall fyri Reynagarð




Um størri umbygning varð framd:

Reseptiónshølir
Fundarrúm
Audiotorium
Fjølmiðlarúm
Bókasavn og samrøðurúm
Skrivstovur
Køkur, kaffistova
Kantina
Klædnagoymsla
Goymslurúm
Skjalagoymslur
Brannboks

WC/Bað
Reingerðarrúm
Kopi



15. K.Poulsen,( Á Kák) Reynag.




2. hædd / loft




1. hædd




Kjallari (ligur)

Samrøðurúm
Skrivstovur
Gestaíbúð / bústaður
Verkætlanarrúm

Klædnagoymsla
WC/Bað
Kopi



16. Suðurlonin, Reynag.




2. hædd / loft




1. hædd

Samrøðurúm
Gestaíbúð
Verkætlanarrúm
Framsýningarhøli /søga-fornminni

Klædnagoymsla
WC/Bað
Kopi

Arkitektavirkið Kontrast | Postrúm 226, FO-110 Tórshavn | Tlf 36 3100 / 56 3100 | mayfinn@kontrast.fo



17. Juul Olsen,vest. Reynag.




3. hædd / loft




2. hædd




1. hædd



Kjallari (lágur)

Samrøðurúm
Skrivstovur ???
Gestaíbúð/ bústaður
Verkætlanarrúm

Klædnagoymsla

WC/Bað
Kopi



18. Johs.J.Olsen,eyst ( Við Stein). Reynag.




2. hædd / loft




1. hædd



Kjallari (lágur)

Samrøðurúm
Skrivstovur ???
Gestaíbúð/ bústaður
Verkætlanarrúm

Klædnagoymsla

WC/Bað
Kopi



19. Egholms hús







Samrøðurúm
Skrivstovur
Gestaíbúð/ bústaður
Verkætlanarrúm

Klædnagoymsla

WC/Bað
Kopi

---



20. Evensens pakkhús










Serliga vælegnað til størri samkomur

Móttøka
Reseptiónshølir
Fundarrúm
Audiotorium
Samrøðurúm
Fjølmiðlarúm
Bókasavn
Skrivstovur og verkætlanarúm
Køkur, kaffistova
Kantina/ matstova

Klædnagoymsla
Goymslurúm
Skjalagoymslur

WC/Bað
Reingerðarrúm
Kopi

KONTRAST



21. Kristnastova



22. Skansagarður




2. hædd / loft




2. hædd / loft




1. hædd




1. hædd




Kjallarahædd



Kjallari (lágur)

Samrøðurúm
Skrivstovur
Gestaíbúð/ bústaður
Fundarrúm
Verkætlanarrúm

Klædnagoymsla

WC/Bað
Kopi

Samrøðurúm
Skrivstovur
Gestaíbúð / bústaður
Hvílíøki hjá løgmanni
Verkætlanarrúm

Klædnagoymsla
WC/Bað
Reingerðarrúm

Kopi

KONTRAST

# Friðingar, klausulir og byggisamtyktir

# Tinganes sum fornminni og ferðavinnumál í framtíðini

**Internetportal**

**Framsýningarhølið**

**Framsýning**

**Faldara**

**Skelting**

**Rundvísing**

Arkitektavirkið Kontrast | Postrúm 226, FO-110 Tórshavn | Tlf 36 3100 / 56 3100 | mayfinn@kontrast.fo

KONTRAST

# Kostnaðarmeting




# Skansapakkh.-Salurin

## Rúm og fermetrar

Gólvvídd á lofti roknað frá vaðingsveggi hædd 90 cm.
Rúmhædd min. 2,20 m.

| | m2 | m2 - íroknað innveggir |
|---|---|---|
| **<u>3. HÆDD / LOFT</u> (Skansapakkhúsið)** | | |
| Skrivstova / eysturendi | 17,8 | |
| Skrivstova / eysturendi | 17,8 | |
| Skrivstova / miðrúm | 40,0 | |
| Skrivstova (vesturendi) | 18,4 | |
| Gangur (edv - krossfelti) | 9,8 | |
| Wc | 2,7 | |
| **<u>Tilsamans</u>** | | **107,0** |
| | | |
| **<u>2. HÆDD</u>** | | |
| Gangur-trappa (Skansapak.) | 26,8 | |
| Loftstrappa (Skansapak.) | 3,0 | |
| Skrivstova / skrivari (Skansapak.) | 14,5 | |
| Skrivstova / løgmaður (Skansapak.) | 30,6 | |
| Skrivstova / løgmansstjóri (Skansapak.) | 23,4 | |
| Fundarhøli (Skansapak.) | 34,5 | |
| Gangur - trappa (Salurin) | 20,0 | |
| Skrivstova (Salurin) | 21,2 | |
| Skrivstova (Salurin) | 14,3 | |
| **<u>Tilsamans</u>** | | **189,0** |

KONTRAST

## 1. HÆDD

| | | |
|---|---|---|
| Durur (Salurin) | 5,2 | |
| Wc (Salurin) | 2,7 | |
| Gangur-trappa (Skansapak.) | 13,2 | |
| Fundarhøli / eysturstova (Skansapak.) | 47,3 | |
| Stova / miðstova (Skansapak.) | 19,0 | |
| Stova / vesturstova (Skansapak.) | 27,7 | |
| Forrúm-køkur (Skansapak.) | 14,3 | |
| Kaffistova (Salurin) | 27,7 | |
| Bókasavn - bíðirúm (Salurin) | 26,7 | |
| Gangur - trappa niður (Salurin) | 10,4 | |
| **Tilsamans** | | **201,0** |

## KJALLARAHÆDD

| | | |
|---|---|---|
| Matstova (Salurin + Skansapakkhúsið) | 111,0 | |
| Durur v/ garderobu (Skansapakkhúsið) | 5,5 | |
| wc (Skansapakkhúsið) | 3,0 | |
| wc (Salurin) | 2,8 | |
| Gangur (Salurin) | 9,6 | |
| Køkur (Salurin) | 12,0 | |
| Rúm - reingerð/skrivst. (Salurin) | 3,8 | |
| Trappurúm (Salurin) | 9,7 | |
| Rúm - teknik/el. | 4,0 | |
| **Tilsamans** | | **167,0** |

| | | |
|---|---|---|
| **TILSAMANS** | | **664,0 x………………..** |

KONTRAST



# Sjó- og Vektabúðin

## Rúm og fermetrar

Gólvvídd á lofti roknað frá vaðingsveggi hædd 90 cm.
Rúmhædd min. 2,20 m.

| | m2 | m2 - íroknað innveggir |
|---|---|---|
| **3. HÆDD / LOFT** | | |
| Fundarhøli | 74,5 | |
| Bókasavn, te-køkur, trappa | 79,1 | |
| Lyft, forrúm, wc | 8,8 | |
| **Tilsamans** | | **166,5** |
| **2. HÆDD** | | |
| Skrivstovustjóri | 20,2 | |
| Skrivari | 11,8 | |
| 6 fulltrúar á 12,4 m2 | 74,4 | |
| Forstova | 29,7 | |
| Lyft, klædnarúm, wc | 10,1 | |
| Gongd - trappa | 39,6 | |
| **Tilsamans** | | **203,1** |
| **1. HÆDD** | | |
| Skrivstovustjóri | 20,5 | |
| Skrivari | 11,9 | |
| 4 fulltrúar á 12,9 m2 | 51,6 | |
| 1 fulltrúi á 10,8 m2 | 10,8 | |
| Journal | 19,6 | |
| Avgreiðsla | 14,1 | |
| Forstova | 16,1 | |
| Gangur | 42,7 | |
| Lyft, klædnarúm, wc | 10,7 | |
| *Tilsamans* | | **210,6** |

Arkitektavirkið Kontrast | Postrúm 226, FO-110 Tórshavn | Tlf 36 3100 / 56 3100 | mayfinn@kontrast.fo

KONTRAST

**<u>KJALLARAHÆDD</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Skjalasavn | 64,8 | |
| Skjalasavn (suður-vestur) | 18,4 | |
| Skjalasavn (norður-vestur) | 15,0 | |
| Edv- og Tlf.rúm | 15,5 | |
| Kopirúm | 11,7 | |
| Reingerð | 8,6 | |
| Trappa, gongd, lyft, wc | 17,9 | |
| Teknikkrúm (sprinkl., lyft, hitaveksl., eltalva) | 9,3 | |
| *<u>Tilsamans</u>* | | **169,2** |

| | | |
|---|---|---|
| *TILSAMANS* | | **749,4 x .........** |



# Bakkapakkhúsið

## Rúm og fermetrar

Gólvvídd á lofti roknað frá vaðingsveggi hædd 90 cm.
Rúmhædd min. 2,20 m.

| | **m2** | **m2 - íroknað innveggir** |
|---|---|---|
| **<u>3. HÆDD / LOFT</u>** | | |
| Skrivstova / suðurendi | 20,8 | |
| Skrivstova / kvistur | 13,2 | |
| Gangur-trappa | 8,1 | |
| Goymsla (gjøgnumgongd) | 11,1 | |
| Goymslurúm | 5,9 | |
| **<u>Tilsamans</u>** | | **61,6** |
| **<u>2. HÆDD</u>** | | |
| Gangur-forrúm-trappur | 18,4 | |
| Wc | 2,0 | |
| Skrivstova | 18,1 | |

| | | |
|---|---|---|
| Skrivstova | 13,1 | |
| Forrúm | 16,8 | |
| Forrúm | 14,6 | |
| **Tilsamans** | | **96,2** |

| | | |
|---|---|---|
| **1. HÆDD** | | |
| Gangur - trappa | 11,1 | |
| Wc | 2,0 | |
| Kopirúm | 4,2 | |
| Skrivstova (útbygn.) | 21,9 | |
| Skrivstova / suðurendi | 29,0 | |
| Skrivstova / norðurendi | 30,9 | |
| Hitavekslara-rúm | 4,6 | |
| **Tilsamans** | | **108,0** |

| | | |
|---|---|---|
| **TILSAMANS** | | **265,8** |



Rúm og fermetrar

# Leigubúðin

Gólvvídd á lofti roknað frá vaðingsveggi hædd 90 cm.
Rúmhædd min. 2,20 m.

| | m2 | m2 - íroknað innveggir |
|---|---|---|
| **2. HÆDD / LOFT** | | |
| Goymsla | 40,8 | |
| Tlf. og krossfelti | 3,8 | |

| | | |
|---|---|---|
| **Tilsamans** | | **44,7** |

**1. HÆDD**

| | | |
|---|---|---|
| Forrúm og køkur | 22,8 | |
| Durur | 2,7 | |
| Goymsla | 2,5 | |
| Skrivstova *(stjóri)* | 23,6 | |
| Skrivstova *(landsstýrism.)* | 29,8 | |
| Skrivstova *(skrivari)* | 6,6 | |
| **Tilsamans** | | **89,1** |

**KJALLARAHÆDD**

| | | |
|---|---|---|
| Skjalagoymsla | 24,0 | |
| Høli undir umbygging | 32,8 | |
| **Tilsamans** | | **58,0** |

| | | |
|---|---|---|
| **TILSAMANS** | | **191,8** |



# Munkastovan

## Rúm og fermetrar

Gólvvídd á lofti roknað frá vaðingsveggi hædd 90 cm.
Rúmhædd min. 2,20 m.

| | m2 | m2 - íroknað innveggir |
|---|---|---|
| **2. HÆDD / LOFT** | | |
| Loftsrúm | 16,3 | |
| **Tilsamans** | | **16,3** |
| **1. HÆDD** | | |
| Durur | 3,3 | |
| Goymsla | 24,6 | |
| **Tilsamans** | | **28,3** |

| | | |
|---|---|---|
| **KJALLARAHÆDD** | | |
| Durur | 3,3 | |
| Goymsla | 24,6 | |
| **Tilsamans** | | **28,3** |
| | | |
| **TILSAMANS** | | **72,9** |



# Skibsteds pakkhús

## Rúm og fermetrar

Gólvvídd á lofti roknað frá vaðingsveggi hædd 90 cm.
Rúmhædd min. 2,20 m.

| | m2 | m2 - íroknað innveggir |
|---|---|---|
| **LOFTSHÆDD** | | |
| Fundarhøli, trappa | 40,3 | |
| **Tilsamans** | | **40,3** |
| | | |
| **1. HÆDD** | | |
| Gangur | 6,5 | |
| Durur | 1,8 | |
| Wc-rúm | 2,5 | |
| Reingerð, klæðn., hitaveksl., edv. | 3,7 | |
| Te-køkur | 5,4 | |
| Skrivstova | 15,2 | |
| Skrivstova, trappa | 32,8 | |
| **Tilsamans** | | **69,9** |
| | | |
| **KJALLARAHÆDD** | | |
| Goymsla | 58,6 | |
| **Tilsamans** | | **58,6** |
| | | |
| **TILSAMANS** | | **168,8** |

KONTRAST



# Stokkastovan - neyst

Rúm og fermetrar

| | m2 | m2 - íroknað innveggir |
|---|---|---|
| **2. HÆDD / LOFT** | | |
| Stokkastovan | 73,5 | |
| **Tilsamans** | | **73,5** |
| **1. HÆDD** | | |
| Stokkastovan | 73,5 | |
| Bøkjaríið (1. hædd á síðubygningi) | 26,4 | |
| **Tilsamans** | | **101,1** |
| **KJALLARI** | | |
| Stokkastova ***(krúpikjallari)*** | 71,2 | |
| Neystið (Kjallari á síðubygningi) | 26,8 | |
| **Tilsamans** | | **100,6** |
| **TILSAMANS** | | **275,2** |



# Sethúsini

Rúm og fermetrar

Gólvvídd á lofti roknað frá vaðingsveggi hædd 90 cm.
Rúmhædd min. 2,20 m.

| | m2 | m2 - íroknað innveggir |
|---|---|---|

KONTRAST

| 2. HÆDD / LOFT | | |
|---|---|---|
| Skrivstova (suðurendi) | 16,5 | |
| Skrivstova (kvistur) | 10,0 | |
| Skrivstova v/kvisti | 32,6 | |
| Avgreiðsla, bókasavn v.m. | 45,6 | |
| **Tilsamans** | | **105,3** |

| 1. HÆDD | | |
|---|---|---|
| Durur | 2,3 | |
| Gangur, print/kopimask. | 31,4 | |
| Trappa/trappurúm | 2,9 | |
| Avgreiðsla | 8,6 | |
| Skrivstova (suðurendi vestursíða) | 14,3 | |
| Skrivstova (norðurendi vestursíða) | 9,0 | |
| Skrivstova v/goymslurúmi (suðurendi eystursíða) | 25,1 | |
| Skrivstova (eystursíða) | 10,8 | |
| Skrivstova (eystursíða) | 11,0 | |
| Skrivstova (eystursíða) | 28,8 | |
| Kaffistova | 11,9 | |
| Reingerð | 3,3 | |
| 2 wc-rúm, forrúm, gangur | 8,5 | |
| **Tilsamans** | | **172,0** |

| KJALLARAHÆDD | | |
|---|---|---|
| Goymsla | 95,5 | |
| Hitavekslari, Edv-krossf. | 17,1 | |
| **Tilsamans** | | **114,7** |

| | | |
|---|---|---|
| **TILSAMANS** | | **392,0** |

KONTRAST



# Bryggihúsið

## Rúm og fermetrar

Gólvvídd á lofti roknað frá vaðingsveggi hædd 90 cm.
Rúmhædd min. 2,20 m.

| | m2 | m2 - íroknað innveggir |
|---|---|---|
| **2. HÆDD / LOFT** | | |
| Skrivstova, fundarhøli, te-køkur, trappa | 24,0 | |
| **Tilsamans** | | **24,0** |
| **1. HÆDD** | | |
| Verkstaður | 33,3 | |
| Wc | 1,9 | |
| Gangur - trappa | 4,2 | |
| **Tilsamans** | | **40,6** |
| **KJALLARAHÆDD** | | |
| Hitavekslari - goymsla | 34,5 | |
| **Tilsamans** | | **34,5** |
| **TILSAMANS** | | **99,1** |

Arkitektavirkið Kontrast | Postrúm 226, FO-110 Tórshavn | Tlf 36 3100 / 56 3100 | mayfinn@kontrast.fo

KONTRAST



# Portugálið

## Rúm og fermetrar

Gólvvídd á lofti roknað frá vaðingsveggi hædd 90 cm.
Rúmhædd min. 2,20 m.

| | m2 | m2 - íroknað innveggir |
|---|---|---|
| **3. HÆDD / LOFT** | | |
| Skrivstova | 9,3 | |
| Skrivstova | 16,8 | |
| Goymsla ***(lágt rúmt) gólvvídd 4,5 m2*** | | |
| Forrúm - trappa (arkiv, kopimask.) | 9,6 | |
| **Tilsamans** | | **37,5** |
| **2. HÆDD** | | |
| Skrivstova | 11,4 | |
| Skrivstova | 11,0 | |
| Skrivstovuøki - tekøkur - trappa (loft) | 20,6 | |
| **Tilsamans** | | **44,1** |
| **1. HÆDD** | | |
| Forstova, trappa | 9,0 | |
| Fundarhøli | 24,1 | |
| Wc-rúm | 1,3 | |
| Reingerð. | 0,6 | |
| **Tilsamans** | | **35,4** |
| **KJALLARAHÆDD** | | |
| Undir umvæling / ikki í nýtslu (hitavekslari) | 19,8 | |
| **Tilsamans** | | **19,8** |
| **TILSAMANS** | | **136,8** |

KONTRAST



# Pakkh. á Sælingahellu

Rúm og fermetrar

| | m2 | m2 - íroknað innveggir |
|---|---|---|
| **I. HÆDD** | | |
| Durur | 4,9 | |
| Wc-rúm | 4,0 | |
| Gangur | 6,3 | |
| Skrivstova v/ tekøki | 13,8 | |
| Skrivstova | 18,3 | |
| Skrivstova | 17,8 | |
| Skrivstova | 19,2 | |
| **Tilsamans** | | **89,7** |
| | | |
| **KJALLARAHÆDD** | | |
| Goymsla | 16,9 | |
| Fýrrúm (hitamiðstøð) | 22,1 | |
| Edv og nobreak-annlegg | 15,8 | |
| Tlf. / krossfelt. | 5,0 | |
| **Tilsamans** | | **65,4** |
| | | |
| **TILSAMANS** | | **155,1** |

Arkitektavirkið Kontrast | Postrúm 226, FO-110 Tórshavn | Tlf 36 3100 / 56 3100 | mayfinn@kontrast.fo

KONTRAST



# Hjallur / neyst

## Rúm og fermetrar

| | m2 | m2 - íroknað innveggir |
|---|---|---|
| **HJALLUR** | 17,7 | |
| **Tilsamans** | | **17,7** |
| **NEYST** | 13,3 | |
| **Tilsamans** | | **13,3** |
| **TILSAMANS** | | **31,0** |

Arkitektavirkið Kontrast | Postrúm 226, FO-110 Tórshavn | Tlf 36 3100 / 56 3100 | mayfinn@kontrast.fo

KONTRAST



# Síðubygn. Ev. pakkhús

## Rúm og fermetrar

Gólvvídd á lofti roknað frá vaðingsveggi hædd 90 cm.
Rúmhædd min. 2,20 m.

| | m2 | m2 - íroknað innveggir |
|---|---|---|
| **2. HÆDD / LOFT** | | |
| Loftsrúm | 42,8 | |
| **Tilsamans** | | **42,8** |
| **1. HÆDD** | | |
| Goymslurúm | 61,0 | |
| **Tilsamans** | | **61,0** |
| **TILSAMANS** | | **103,8** |

KONTRAST



# K. Poulsen (Reynag.)

## Rúm og fermetrar

Gólvvídd á lofti roknað frá vaðingsveggi hædd 90 cm.
Rúmhædd min. 2,20 m.

| | m2 | m2 - íroknað innveggir |
|---|---|---|
| **2. HÆDD / LOFT** | | |
| Gangur - trappa | 3,4 | |
| Skrivstova (eysturendi) | 8,1 | |
| Fundarhøli | 12,2 | |
| Goymsla (suðursíða) | 2,2 | |
| Goymsla (norðursíða) | 2,1 | |
| **Tilsamans** | - | **28,8** |
| **1. HÆDD** | | |
| Durur - trappa | 3,3 | |
| Skrivstova (norður) | 11,5 | |
| Skrivstova (suður) | 13,1 | |
| Forrúm - kopirúm | 6,9 | |
| Køkur | 13,2 | |
| Wc-brúsa | 2,7 | |
| **Tilsamans** | - | **51,9** |
| **KJALLARI (lágur)** | | |
| Kjallararúm | 20,2 | Rúmhædd undir 2,20 m |
| **Tilsamans** | - | **20,2** |
| **TILSAMANS** | | **100,9** |

Arkitektavirkið Kontrast | Postrúm 226, FO-110 Tórshavn | Tlf 36 3100 / 56 3100 | mayfinn@kontrast.fo

KONTRAST



# Suðurlonin (Reynag.)

## Rúm og fermetrar

Gólvvídd á lofti roknað frá vaðingsveggi hædd 90 cm.
Rúmhædd min. 2,20 m.

| | m2 | m2 - íroknað innveggir |
|---|---|---|
| **2. HÆDD / LOFT** | | |
| Gólvvídd | 18,2 | Rúmhædd undir 2,20 m |
| **Tilsamans** | - | **18,2** |
| **1. HÆDD** | | |
| Gólvvídd | 35,7 | Rúmhædd undir 2,20 m |
| **Tilsamans** | | **35,7** |
| **TILSAMANS** | | **53,9** |

Arkitektavirkið Kontrast | Postrúm 226, FO-110 Tórshavn | Tlf 36 3100 / 56 3100 | mayfinn@kontrast.fo

KONTRAST



# J.J.Olsen, vest. (Reynag.)

## Rúm og fermetrar

Gólvvídd á lofti roknað frá vaðingsveggi hædd 90 cm.
Rúmhædd min. 2,20 m.

| | m2 | m2 - íroknað innveggir |
|---|---|---|
| **3. HÆDD / LOFT** | | |
| Kamar | 2,8 | |
| Loftrúm-trappa | 6,2 | |
| **Tilsamans** | | **9,1** |
| **2. HÆDD** | | |
| Gangur-trappa | 2,1 | |
| Kamar | 10,6 | |
| Wc-brúsirúm | 7,7 | |
| **Tilsamans** | | **20,6** |
| **1. HÆDD** | | |
| Durur | 2,4 | |
| Gangur-trappa | 0,7 | |
| Køkur | 7,3 | |
| Spískamar | 1,4 | |
| Stova | 9,8 | |
| **Tilsamans** | | **23,0** |
| **KJALLARI (lágur)** | | |
| Gólvvídd | 13,7 | Rúmhædd undir 2,20 m |
| **Tilsamans** | | **13,7** |
| **TILSAMANS** | | **66,4** |

KONTRAST



# J.J.Olsen, eyst. (Reynag.)

## Rúm og fermetrar

Gólvvídd á lofti roknað frá vaðingsveggi hædd 90 cm.
Rúmhædd min. 2,20 m.

| | m2 | m2 - íroknað innveggir |
|---|---|---|
| **2. HÆDD / LOFT** | | |
| Kamar (norðurendi) | 4,0 | |
| Kamar (miðrúm) | 9,4 | |
| Forrúm-trappa | 2,6 | |
| **Tilsamans** | - | **16,4** |
| | | |
| **1. HÆDD** | | |
| Durur | 2,0 | |
| Wc-brúsa | 2,3 | |
| Køkur - trappa | 5,4 | |
| Stova | 13,6 | |
| **Tilsamans** | - | **23,6** |
| | | |
| **KJALLARI (lágur)** | | |
| Kjallararúm | 16,2 | Rúmhædd undir 2,20 m |
| **Tilsamans** | - | **16,2** |
| | | |
| **TILSAMANS** | - | **56,2** |

Arkitektavirkið Kontrast | Postrúm 226, FO-110 Tórshavn | Tlf 36 3100 / 56 3100 | mayfinn@kontrast.fo

KONTRAST



# Egholms hús, Reynag.

## Rúm og fermetrar

Gólvvídd á lofti roknað frá vaðingsveggi hædd 90 cm.
Rúmhædd min. 2,20 m.

| | m2 | m2 - íroknað innveggir |
|---|---|---|
| **2. HÆDD / LOFT** | | |
| Skrivstova / eystursíða | 7,1 | |
| Skrivstova / vestursíða | 8,9 | |
| Skrivstova / norðurendi | 11,1 | |
| Skrivstova / suðurendi | 13,4 | |
| Gangur - trappa | 4,1 | |
| Millumgangur | 4,3 | |
| **Tilsamans** | | **50,3** |
| **1. HÆDD** | | |
| Gangur-trappa | 6,3 | |
| Wc | 2,2 | |
| Skrivstova / suðurendi | 18,6 | |
| Skrivstova / eystursíða | 11,7 | |
| Fundarhøli | 9,7 | |
| Forrúm | 9,2 | |
| Tekøkur | 5,6 | |
| **Tilsamans** | | **64,3** |
| **TILSAMANS** | | **114,6** |

Arkitektavirkið Kontrast | Postrúm 226, FO-110 Tórshavn | Tlf 36 3100 / 56 3100 | mayfinn@kontrast.fo

KONTRAST



# Evensens pakkhús

## Rúm og fermetrar

Gólvvídd á lofti roknað frá vaðingsveggi hædd 90 cm.
Rúmhædd min. 2,20 m.

| | m2 | m2 - íroknað innveggir |
|---|---|---|
| **<u>2. HÆDD / LOFT</u>** | | |
| Goymslurúm | 205,4 | |
| **<u>Tilsamans</u>** | - | **205,4** |
| **<u>1. HÆDD</u>** | | |
| Goymslurúm | 146,2 | |
| wc | 4,4 | |
| Arbeiðsrúm v/tekøki | 21,1 | |
| Arbeiðsrúm | 31,8 | |
| Fýrúm | 3,5 | |
| **<u>Tilsamans</u>** | - | **208,9** |
| **<u>KJALLARAHÆDD</u>** | | |
| Kjallararúm | 192,0 | |
| **<u>Tilsamans</u>** | | **192,0** |
| **<u>TILSAMANS</u>** | | **606,3** |

KONTRAST



# Kristnastova

## Rúm og fermetrar

Gólvvídd á lofti roknað frá vaðingsveggi hædd 90 cm.
Rúmhædd min. 2,20 m.

| | m2 | m2 - íroknað innveggir |
|---|---|---|
| **2. HÆDD / LOFT** | | |
| Gangur-trappa | 8,7 | |
| Skrivstova / norðursíða | 24,0 | |
| Skrivstova / suðursíða-eystur | 16,3 | |
| Skrivstova /suðursíða-vestur | 12,2 | |
| **Tilsamans** | - | 63,5 |
| **1. HÆDD** | | |
| Gangur-trappur | 12,2 | |
| Fundarhøli | 29,5 | |
| Køkur | 8,4 | |
| Wc-forrúm - reingerð | 7,8 | |
| 2 wc-rúm á 1,7 m2 | 3,4 | |
| **Tilsamans** | - | 63,5 |
| **KJALLARAHÆDD** | | |
| Skrivstova og trappa | 23,5 | |
| Skrivstova suðursíða-eystur | 14,0 | |
| Skrivstova suðursíða-vestur | 10,0 | |
| Fýrrúm | 4,0 | |
| **Tilsamans** | - | 55,0 |
| **TILSAMANS** | | **182,0** |

Arkitektavirkið Kontrast | Postrúm 226, FO-110 Tórshavn | Tlf 36 3100 / 56 3100 | mayfinn@kontrast.fo

KONTRAST



# Skansagarður

## Rúm og fermetrar

Gólvvídd á lofti roknað frá vaðingsveggi hædd 90 cm.
Rúmhædd min. 2,20 m.

| | m2 | m2 - íroknað innveggir |
|---|---|---|
| **2. HÆDD / LOFT** | | |
| Skrivstova | 12,3 | |
| Rúm undir umvæling (stórt) | 29,1 | |
| Rúm undir umvæling (2 smá) | 16,9 | |
| Gangur, trappa | 3,6 | |
| **Tilsamans** | | **64,0** |
| **1. HÆDD** | | |
| Gangur, trappa | 5,2 | |
| Wc-rúm | 1,8 | |
| Reingerð. | 1,4 | |
| Teknikkrúm | 5,3 | |
| Køkur | 6,9 | |
| Skrivstova (til fleiri) | 42,7 | |
| Skrivstova - fundarhøli | 20,7 | |
| Durur (bakdyr) | 3,1 | |
| **Tilsamans** | | **90,8** |
| **KJALLARI (lágur)** | | |
| Hitavekslari | 73,5 | |
| **Tilsamans** | | **73,5** |
| **TILSAMANS** | | **228,3** |

# Tíðarætlan